**Semja millum øðrumegin Fíggjarmálaráðið**
**og hinumegin**
**Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna**
**2010**

## 1. Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2010 til 1. oktober í 2011. Semjan byggir á ein karm, sum er um leið 1%.

## 2. Almennar lønarhækkingar

Tann 1. oktober í 2010 hækkar lønin 2,5%, samstundis sum teir í §16 stk 3 nevndu eyka frídagarnir fella burtur. Eftir 2. februar í 2011 verða ikki hildnir frídagar eftir hesari áseting.

## 3. Aðrar broytingar

Í § 1 verður stk. 2 soljóðandi: *Tá ið starv er leyst, verður tað alment lýst leyst at søkja.*

Í § 3 verður stk. 4 soljóðandi: *Fyri lakkeringsarbeiði verður roknað 1½ tíma eyka um tíman.*

Í § 5 stk. 2 verður skrivað "*3 vanligar tímar eyka*" í staðin fyri "2 vanligar tímar eyka".

Í § 6 verður skrivað *"bara"* í staðin fyri "bert".

Í § 16 verður stk. 3 strikað.

Í § 17 verður skrivað "*starv*" í staðin fyri "starvið".

Í § 19 verður sett inn: *"Er handverkari valdur sum álitisfólk, verður uppsagnarfreistin longd við 3 mánaðum"*.

## 4. Ígildiskoma

§ 23 verður soljóðandi: *Hesin sáttmáli er galdandi frá 1. oktober í 2010, og báðir partar kunnu siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. oktober í 2011.*

## 5. Dagføring

Sáttmáli og lønartalvur eru dagførdar eftir omanfyristandandi.

*Á Argjum 2. februar í 2011*

Føroya Handverkarafelag | Landsfelag Handverkaranna | Fíggjarmálaráðið